# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# EINA SAKLIGA VIÐGERÐ, TAKK

Í hesum døgum verður síðsta hond løgd á fíggjarlógaruppskotið fyri 2011. Í grein her í blaðnum fríggjadagin fanst Bjarni Djurholm, løgtingsmaður úr Fólkaflokkinum at sínum samstarvsfeløgum í løgtinginum fyri lítlan vilja at skerja í almenna húsarhaldinum, og hetta heldur hann vera greitt signal um, at lítil politiskur vilji er til at taka truplar avgerðir, so búskapurin sleppur at tillaga seg veruleikan.

Løgtingið samtykti fyrr í ár - einmælt - ein nýtslukarm fyri árini fram til 2015, og semja er eisini um, at tá skal undirskotið á fíggjarlógini vera burtur.

Men Bjarni Djurholm heldur ikki, at politiska skipanin hevur rygg til at gera neyðugu broytingarnar. Hann vísir á, at alt ov nógv tingfólk ganga solo og arbeiða bara fyri sær sjálvum, at Javnaðarflokkurin púra opinskáraður fríggjar til Tjóðveldi, at andstøðan einki alternativ er, tí tað er ein »forsamling, sum livir í politiskari pseudotilveru og signalpolitikki uttan substans og kann ikki takast á álvara«.

Hann vísir á, at neyðugt er at prioritera - at serfrøðin vísir á, at helmingurin av landskassahallinum er av bygnaðarskeivleikum. Men niðurstøðan hjá Bjarna Djurholm er heldur døpur - at politiska skipanin als ikki er før fyri at gjøgnumføra neyðugu reformarnar.

Vit mugu so bara vóna, at løgtingið ikki fer at langa bremsurnar so hart í, at alt samfelagið steðgar upp. Herman Oskarsson, fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum hevur so mangan víst á, at í slíkum tíðum er neyðugt, at landskassin átekur sær tað neyðuga hallið, sum skal til, fyri at samfelagið skal koyra so nøkulunda gjøgnum krepputíðir.

Tá ið tíðirnar eru góðar, er tað náttúrligt at tað almenna hevur yvirskot á fíggjarlógini, men samstundis er tað náttúrligt at hava undirskot, tá ið tíðirnar gerast verri, ella útlit eru fyri verri tíðum. Tað er heilt burturvið at siga, at tað almenna ongantíð aftur skal hava undirskot, heldur hann.



Hóast arbeiðsloysið ikki er so stórt, sum tað onkuntíð hevur verið, so merkir vinnan, at fólk ikki brúka pengar, og tað er ein trupulleiki.

Vit ynskja okkum, at fíggjarlógaruppskotið fer at skapa optimismu, at vit fáa eina sakliga viðgerð, sum ikki skal snúgva seg um tunlar ella druknar í kjaki um sparingar á almannaøkinum.

Politikararnir skylda okkum eina sakliga viðgerð, sum skal elva til framburð og optimismu.

**Tað er nátúrligt at tað almenna hevur hall í kreppu**



*Feskastu fyrstu g'ararnir uttan fyri Norðurlandahúsið*

*Mynd: Martin Sirkovski*

## Nýggja ættarliðið í Hoydølum

Við skúlaársbyrjan hevði Føroya Studentaskúli og HF-skeið innleiðsluviku fyri einum metstórum tali av nýggjum næmingum. Eini 300 ung luttóku í einari røð av tiltøkum, sum teir ymisku fakbólkarnir fyriskipaðu bæði í Hoydølum og – sum nakað nýtt – eisini í Norðurlandahúsinum.

Sum eitt av tiltøkunum skuldi flokkarnir sniðgeva hvør sína floks-T-shirt, sum síðani varð brúkt sum eyðkennisbúni, tá ið kappingar fóru fram. Næmingafjøldin sæst her sum ælabogin - har hvør einstakur dropi er við til at mynda sín lit, og hvør litur er við til at gera ta størri eindina, sum er annað og meira enn bara regndropar í sólskini – eitt nýtt ættarlið á veg.

## Dimma ikki á húsagang

Sosialurin heldur fram við at skriva, at Dimmalætting fór á húsagang. Seinast í blaðnum, sum kom mánadagin. Vinarliga rætta hetta. Dimmalætting var seld nýggjum eigarum uttan at fara á húsagang. So gevist vinarliga við at skriva hesi ósannindi.

***Árni Gregersen***
***stjóri***





**Mugu hava sertannlækna**

SIGRUN WARDUM
KJAK Á SÍÐU 16



**Kristindómur skal vera fyri øll?**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 40



## Um at halda kjaft

Bjarni Djurholm stólar ikki upp á sínar felagar í samgonguni. Hann heldur ikki, at teir eru førir fyri at gjøgnumføra teir reformar, sum skulu til. Hann sigur, at skattgjaldarar og serstakliga vinnan hava tíverri ikki annað í væntu enn somu tilgongd, sum vit hava sæð farnu tíðina - rokningar fyri nýtslu, sum ikki er í samsvari við framleiðsluna í landinum.

- Her má vend koma í, heldur hann.

Men tað fíggjarmálaráðharrin heldur ikki, at ein samgongufelagi skal siga, so hann bað hann stutt og greitt - um enn við sitati frá norska tjóðarskaldinum Bjørnstjerne Bjørnson - halda kjaft.

Men Edmund Joensen er ikki samdur. Hann heldur ikki, at ónøgdir samgongufelagar skulu halda kjaft. Tvørturímóti eiga teir at siga sína hugsan, tá teir ikki verða tiknir upp á ráð.

Og løgmaður, hann er so slett ikki samdur.

- Veruleikin er, at tað gongur framá í føroyska búskapinum, sigur hann.

---

*Vit halda:*
*At hetta er føroyskur politikkur í einum nøtuhylki - og disse regeres vi af!*

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00
Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo